UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Valdi Keypmannahavn

Microsoft hevur gjørt av at halda sína árligu evropeisku ráðstevnu og framsýning Microsoft IT Forum 2002 í Keypmannahavn. Framsýningin verður í Bella Centrinum frá 19. til 22. november.

Leiðslan í Bella Centrinum sigur, at tey vænta umleið 8.000 fólk úr Evropa, Afrika og Miðeystri til Keypmannahavnar teir fýra dagarnar. Sambært stjóranum í centrinum, Arne Bang Mikkelsen, hevur tað fasta sambandið um Oyrasund verið medvirkandi til, at Microsoft valdi Keypmannahavn sum vert fyri framsýningini í Evropa.

## Statoil seldi

Eftir at donsk bløð hava skrivað, at almenna danska felagið DONG skuldi keypa rættindini hjá Statoil í danska partinum av Norðsjónum, vórðu tíðindini váttað í Noregi í gjár. Sagt varð, at Statoil hevði selt DONG rættindini á trimum leiðum fyri eina mia. danskar krónur.

## Sveits í buktini

Sveits kann forða fyri, at ein nýggj skipan um rentuskatt kann koma í gildi í ES-londunum. Sveits er ikki í ES, men tá tað lítla Luksenburg gekk við til at taka undir við nýggju skipanini, treytaði tað sær, at eisini "bankalond" uttan fyri ES skuldu koma undir skipanina.

Sveitsisku bankarnir eru alt annað enn fegnir um at geva skattamyndugleikunum í ES upplýsingar um rentuinntøkurnar hjá teimum ES-borgarunum ella ES-fyritøkunum, sum hava konti í Sveits. Tí krevur sveitsiska stjórnin at fáa ymsar ágóðar afturfyri, skal hon áleggja bankunum at lata upplýsingarnar. Higartil er tey sveitsisku krøvini so mikið stór, at fleiri ES-lond sýta fyri at góðtaka tey, og tískil kann eitt land uttan fyri ES beina fyri einari nýggjari rentuskattaskipan í samveldinum.

# Niðurlond skelkað av politiskum morði



*Hóast Pim Fortuyn hevði avgjørdar hugsanir um innflytarar og muslimsku trúnna, vildi hann ikki verða borin saman við Jean-Marie Le Pen ella Jørg Haider*

*Mynd: Reuters*

**Politikarar um allan heim fordøma morðið á niðurlendska høgrapolitikaran Pim Fortuyn**

NIÐURLOND

*Árni Joensen*

Tilburðurin seinnapartin mánadagin, tá niðurlendski høgrapolitikarin Pim Fortuyn varð myrdur á gøtuni í býnum Hilversum, hevur skelkað tað niðurlendska fólkið. Allir teir politisku flokkarnir steðgaðu alt fyri eitt valstríðnum upp undir tjóðartingsvalið, sum ætlandi skal haldast tann 15. mai, men sum stjórnin í gjár umhugsaði at útseta orsakað av morðinum.

Tann 54 ára gamli Pim Fortuyn varð rakstur av seks skotum í høvdið, nakkan og bringuna. Morðið hendi um seks-tíðina seinnapartin, tá Fortuyn var á veg úr útvarpshúsunum í Hilversum, har hann hevði verið til eina valsending. Ein sjúkrabilur kom alt fyri eitt á staðið, men allar royndir at fáa lív í tann illa særda mannin miseydnaðust.

Niðurlendska løgreglan boðaði seinni frá, at hon hevði tikið ein mann, sum var undir illgruna fyri at hava skotið høgrapolitikaran. Løgreglan vildi ikki siga, hvør maðurin var, men upplýsti bert, at hann var niðurlendingur.

Politikarar um allan heim fordømdu mánakvøldið morðið og søgdu tað vera eina álvarssama hóttan ímóti teimum demokratisku grundreglunum.

### Kendi seg hóttan

Vinmenn hjá Pim Fortuyn greiddu mánakvøldið frá, at hann hevði kent seg hóttan eftir lívinum. M. a. hevði hann greitt frá, at fremmandafólk høvdu ringt til hansara og hótt hann.

Pim Fortuyn var høgrapolitikari. Hann hevði avgjørdar hugsjónir um tey nógvu fremmandu í Niðurlondum og var m. a. talsmaður fyri, at tey, sum eru komin ólógliga til landið, eiga at verða koyrd av landinum. Hann hevði eisini avgjørdar hugsanir um muslimarnar í Niðurlondum og segði herfyri, at tann muslimska trúgvin er tann størsta hóttanin ímóti mannaættini. Kortini vildi Pim Fortuyn ikki verða borin saman við franska Jean-Marie Le Pen ella eysturríkska Jørg Haider.

Veljarakanningar seinastu dagarnar hava víst, at flokkurin hjá Pim Fortuyn fer at fáa millum 16 og 20 prosent av atkvøðunum á tí komandi tjóðartings-valinum. Eitt tílíkt úrslit hevði gjørt flokkin til tann triðstørsta í Niðurlondum og hevði helst havt við sær, at flokkurin hevði skipað stjórn saman við kristiligu demokratunum.

# Arafat skal útihýsast

**Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, vil hava USA at vraka Yasser Arafat sum palestinskan leiðara**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, leggur ikki fingrarnar ímillum, nú hann er í USA og tosar við George W. Bush, forseta og aðrar amerikanskar leiðarar.

Longu áðrenn hann fór úr Ísrael, segði Sharon, at amerikanska stjórnin eigur at vraka Yasser Arafat sum umboð fyri palestinska fólkið. Talsmenn hjá Sharon hava sagt, at Ísrael er til reiðar at samráðast við palestinar - ikki við Arafat, men við aðrar palestinskar leiðarar. Sharon sjálvur hevur fyrr sagt, at tað hevði verið gagnligt við einari ráðstevnu um Miðeystur, men hann legði eina við, at hann fer ikki til samráðingarborðið saman við Arafat.

Á vitjanini í USA ætlar Sharon at sannføra amerikanarar um, at heldur ikki teir eiga at hava nakað við Arafat at gera. Við sær til USA hevði Arafat eina rúgvu av skjølum, sum sambært ísraelsmonnum prógva, at Arafat í fleiri førum játtaði pengar til felagsskapir, sum skipaðu fyri yvirgangsatsóknum í Ísrael. Skjølini vísa sambært ísraelsmonnum eisini, at trygdartænasturnar hjá Arafat fylgdu gjølla við virkseminum hjá felagsskapum sum Hamas, Islamskum Jihad og Al-Aqsa, men tað er ógreitt, um Arafat eisini góðkendi atsóknirnar hjá felagsskapunum.

Tá hann kom til USA mánadagin, hitti Sharon fyrst Colin Powell, uttanríkisráðharra, og í gjár skuldi hann so tosa við Bush forseta.

Úr Norðurlondum:

## Lýggjur apríl

Tað hevur verið sera lýtt í Noregi í vár - so lýtt, at apríl var tann næstlýggjasti, síðani norska veðurtænastan fór undir at máta hitan fyri 136 árum síðani.

Verður alt Noreg tikið undir einum, var meðalhitin í apríl 2,7 stig, og so lýggjur hevur apríl ikki roynst síðani 1921, tá meðalhitin var 2,9 stig. Í Norðurnoregi var meðalhitin 3,6 stig, og tað er tað sama sum gamla metárið 1937. Har suðuri í Noregi var munurin týðiligur. Í Oslo máldu tey í meðal 6,9 stig, meðan gamli meðalhitin hevur ligið um 4,5 stig. Best kendist munurin tó í Tróndheimi. Í apríl í ár var meðalhitin har 7,2 stig, og tað er júst tvær meiri enn tann gamli meðalhitin í býnum hendan mánaðin.

## Skal frá

Tann umstríddi borgarstjórin í Farum í Danmark, Peter Brixtofte, verður nú settur úr embætinum. Tað avgjørdi innanríkisráðið mánadagin. Borgarstjórin hevur hesa vikuna til at gera viðmerkingar til avgerðina, men kemur einki nýtt fram, stendur avgerðin við makt, sigur innanríkisráðharrin Lars Løkke Rasmussen.

## Russari tikin

Norska sjóverjan tók mánadagin ein russiskan trolara, tí hann royndi á einari stongdari leið sunnan fyri Bjarnoynna. Russiski skiparin segði seg ikki vita, at leiðin var stongd, men tað hjálpti ikki. Russiski trolarin fekk boð um at fylgja við sjóverjuskipinum til Hammerfest, hagar skipini komu í gjár.

Seinastu tíðina hava fólk við tilknýti til fiskivinnuna í Murmansk mótmælt, at norðmenn revsa russisk skip munandi harðari enn norsk, sjálvt um talan er um sama brot á veiðireglurnar. Ein kanning hjá starsadvokatinum í Norðurnoregi staðfesti herfyri, at russisku atfinningarnar eru rættar.


# ítróttur

Nr. 86 • mikudagur • 8. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


Kvinnur: B36-B68 1-0 (1-0)

# B36 kom væl frá byrjan



*Málskjúttin Arnbjørg Danielsen úr B36 í nærdysti við tveir B68-leikarar. Arnbjørg fekk einasta málið í dystinum*

*Mynd: Álvur Danielsen*

**Kvinnuliðið hjá B36 vann fyrsta dystin í hesum kappingarárinum. B36 basti B68 við einum máli móti ongum. Dysturin var leikliga javnur, men B36 skapti fleiri málmøguleikar**

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Arnbjørg Danielsen fekk einasta málið í dystinum. Selma Erol Dahl sendi Arnbjørg avstað í høgru síðu, og hon gjørdist leys við málverjanum. Arnbjørg hevði ikki trupult við at skora til 1-0. Hetta var eftir lítlan hálvan tíma í fyrra hálvleiki.

B36 hevði kanska munin hesa fyrstu løtuna, men B68 kom við aftur, og dysturin var sum heild javnur.

Eftir steðgin legði B68 trýst á B36-málið, men einki spurdist burturúr leikligu yvirvágini. B68 tveitti nógv fólk fram á vøllin, og hetta gav B36 møguleika fyri skjótálopum. Fleiri slík komu í lag, og B36 skapti teir størru málmøguleikarnar eftir steðgin.

Arnbjørg Danielsen hevði tann størsta møguleikan eftir steðgin. Hon kom at standa væl fyri í brotsteiginum, fór framvið fleiri verjuleikarum, men skotið varð steðgað á sjálvari málstrikuni.

Annars var dysturin merktur av, at liðini ikki rættiliga eru komin í dystarvenjing, og tí var nógv óskipað spæl at síggja.

B36 kvinnurnar kundu fegnast eftir dystin, sum kundi farið báðar vegir, men heimaliðið helt høvdið kalt í avgerandi løtuni.

Annars verða hesi bæði liðini mett at enda í oddinum í grundspælinum, og hesi bæði liðini eru kanska tey einastu, sum kunnu geva KÍ harða mótstøðu.

Ein annar dystur skuldi verið leiktur í bestu kvinnudeildini. Tað var millum KÍ og VB, men vegna verkfallið er hesin dysturin útsettur.

**B36 – B68 1-0 (1-0)**

1-0: Arnbjørg Danielsen

## Vejle framvegis í stórum vanda

**Fyri Christian Høgna Jacobsen og Vejle verður dysturin í Silkeborg sunnudagin av sera stórum týdningi**

SUPERLIGAN

Síðsti dysturin í triði síðsta umfarinum í superliguni varð spældur í Esbjerg mánakvøldið. Silkeborg, sum er í vanda fyri at flyta niður, vitjaði og fór avstað aftur við einum stigi. Teir komu á odda stutt undan steðginum, men heimaliðið javnaði, tá tað bara restaðu tveir minuttir.

At Silkeborg megnaði javnleik kann hava avgerandi týdning fyri spurningin um niðurflyting. Tvey umfør eru eftir at spæla, og AGF er framvegis næstaftast. Men bæði Silkeborg og Vejle eru í niður-flytingarvanda. AGF hevur 25 stig, Vejle 28 stig og Silkeborg 29 stig.

Á pappírinum er einki at ivast í, at Silkeborg situr við bestu kortunum, og at tað ikki sær so lætt út hjá Vejle. Um AGF og Vejle fara at standa á jøvnum eftir síðsta umfarið, so noyðist Vejle niður, tí teirra málmunur er verri, enn hann er hjá AGF.

Silkeborg hevur sjálvt møguleikan at avgera sína lagnu. Teir skulu sunnudagin spæla á heimavølli ímóti Vejle, sum tær seinastu ferðirnar ikki hevur funnið pláss fyri Christian Høgna Jacobsen millum teir fyrstu ellivu. Og annan hósdag skal Silkeborg í síðsta umfarinum spæla á útivølli ímóti AGF.

Sunnudagin klossaði Vejle í tí á heimavølli ímóti Lyngby. Komandi sunnudag skal AGF spæla í Lyngby. Tað er neyvan nakað at ivast í, at AGF fer at fáa øll stigini. Vejle skal í síðsta umfarinum spæla á heimavølli ímóti Esbjerg. Tað er møguleiki fyri, at úrslitini í tveimum teimum síðstu umførunum fara at laga seg soleiðis, at tað verður Vejle, sum fer at sita við svarta peri.

**jh**

Kvinnur: GÍ – HB 2-2 (1-1)

## Javnt millum GÍ og HB

**Tað eydnaðist HB at fáa eitt stig við sær úr Gøtu, tá kvinnuliðini møttust. GÍ hevði kanska munin leikliga og brendi eisini eitt brotsspark í dystinum, sum endaði 2-2**

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Tað var heimaliðið, sum legði seg framum í fyrra hálvleiki. Anja Klæmintsdóttir, sum var væl fyri henda dagin, skoraði fyrra málið hjá GÍ. HB svaraði tó skjótt aftur, tá dómarin dømdi brotsspark til útiliðið. Eyðvør Thomsen var ósvitaliga trygg frá brotssparksblettinum, og so var 1-1.

Hetta var eisini støðan í steðginum, men HB megnaði at taka leiðsluna stutt inn í seinna hálvleik. Hesuferð var tað Malan á Dunga, ið skoraði málið. Hóast GÍ hevði havt yvirvág í dystinum, var tað nú brádliga HB, sum var frammanfyri.

Hetta var ein dyggur smeitur fyri heimaliðið, sum tó megnaði at reisa seg aftur. Áðrenn GÍ fekk útjavnandi málið misnýttu tær eitt brotsspark.

Anja Klæmintsdóttir var tó enn einaferð uppá spæl, og hon tryggjaði GÍ annað stigið, tá hon skoraði til 2-2.

Hóast GÍ hevði munin, so skapti HB eisini onkran góðan málmøguleika. Eitt nú rakti Eyðfríð Christiansen tvørstongina í einum undirhaldandi og málríkum dysti í Gøtu.

**GÍ – HB 2-2 (1-1)**

1-0: Anja Klæmintsdóttir

1-1: Eyðvør Thomsen, br.

1-2: Malan á Dunga

2-2: Anja Klæmintsdóttir